


# Val av limum til Umboðsráðið fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

**Í februar mánaði ár 2010 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

**Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna í Tórshavn innan **1. februar 2010.**

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni á Kongabrúnni ella á trygging.fo.

Kongabrúgvin • Postsmoga 329 • 110 Tórshavn • Tel 345 600 • Fax 345 601 • tf@trygging.fo • www.trygging.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

FØROYA HANDILSSKÚLI

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

## AKADEMIÚTBÚGVINGIN Várhálvan 2010

**Treytað av nóg stórari luttøku, verða í vár hesar lærugreinar á Akademiútbúgvingini:**

**Tórshavn**
Fyriskipan ................................ mánadagur
Leiðsla av altjóða samstarvi .... hósdagur
Búskaparstýring ..................... hósdagur
Logistikkur .............................. mikudagur

**Tilmelding á Føroya Handilsskúla í Tórshavn**

**Kambsdalur**
Leiðsla í verki ......................... hósdagur

**Tilmelding á Føroya Handilsskúla á Kambsdali**

Undirvísingin byrjar í viku 6 og er eitt kvøld um vikuna í tíðarskeiðinum 18.00-21.20.

**Tilmeldingarfreistin er 14. januar 2010.**

Innskrivingarseðil og kunning um Akademiútbúgvingina finnur tú á heimasíðu skúlans www.fh.fo. Til ber eisini at venda sær til skúlan.



Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04 N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00




**Vikuskiftistilboð**
El-tannbustir

Braun Oral-B
Fyrr upp til 1.699,-
NÚ frítt val 500,-

Thomas Dam búnýti